SP/F GRANNSKOÐARAFELAGIÐ
RASMUSSEN & WEIHE STATSAUT. REVISORAR
TLF.(+298)11017 · FAX (+298)11018 · Á GLAÐSHEYGGI · BOX 30 · FR-110 TÓRSHAVN · SP/F. NR. 267

# Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin
# 100 Tórshavn

## Ársroknskapur 1994
## (3. roknskaparár)

**AVRIT**

1344R_94.WPD

# Innihaldsyvirlit


Almennar upplýsingar . . . . . . . . . . 2

Roknskaparátekning . . . . . . . . . . 2

Ársfrágreiðing . . . . . . . . . . 3

Grannskoðaraátekning . . . . . . . . . . 5

Nýttur roknskaparháttur . . . . . . . . . . 6

Rakstrarroknskapur fyri 1994 . . . . . . . . . . 7

Fíggjarstøða pr. 31. desember 1994 . . . . . . . . . . 7

Gjaldførisfrágreiðing fyri 1994 . . . . . . . . . . 8

Notur til ársroknskapin . . . . . . . . . . 9

## Almennar upplýsingar

**Stovnurin**

Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin
c/o Toll- og Skattstova Føroya, stýrið
Bryggjubakki 12
FR-110 Tórshavn

**Grannskoðan**

Grannskoðarafelagið
Rasmussen & Weihe, spf.

**Stýrið**

Sigurð Poulsen, formaður
Gunnvør Dam Jensen
Jenny Lydersen
Jógvan Vágsheyg

## Roknskaparátekning

Ársroknskapurin verður saman við ársfrágreiðingini við hesum góðkendur.

Tórshavn, tann

Stýrið:

Sigurð Poulsen, formaður — Gunnvør Dam Jensen

Jenny Lydersen — Jógvan Vágsheyg

**Roknskapurin er góðkendur á stýrisfundi tann**

Fundarstjórin

# Ársfrágreiðing

## Virksemi

Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin er settur á stovn við løgtingslóg nr. 39 frá 7. mei 1991 við seinni broytingum.

Grunnurin hevur til endamáls at tryggja øllum íbúgvum landsins eina arbeiðsmarknaðareftirløn.

Fæ grunsins verður fingið til vega við at allir persónar undir 67 ár rinda grunninum ½ prosent av teirra árligu skattskyldugu inntøku og allir arbeiðsgevarar árliga rinda ½ prosent av útgoldnu A-inntøkunum.

Stovnurin fór undir regluligar útgjaldingar til persónar yvir 67 ár tann 1. apríl 1997.

Við løgtingslóg nr. 68 frá 2. apríl 1993 var avgjørt, at tað av fæi grunsins, sum tann 1. apríl 1993 var yvir 2 mill. kr., varð lænt til Arbeiðsloysistryggingina.

Helvtin av láninum skuldi sambært hesum afturgjaldast 1. apríl 1995 og hin helvtin 1. apríl 1996. Við løgtingslóg nr. 21 frá 4. mars 1994 var afturgjaldsfreistin hjá Arbeiðsloysistryggingini longd við einum ári til ávikavist 1. apríl 1996 og 1. apríl 1997. Einki var tó afturgoldið 1. apríl 1996. Víst verður til tekstin niðanfyri.

Seinni, við løgtingslóg nr. 21 frá 4. mars 1994, var avgjørt, at gjøldini til grunnin í tíðarskeiðnum frá 31. mars til 30. juni 1994 skuldu latast Arbeiðsloysistryggingini sum lán við eini rentu uppá 5% p.a. Hetta lán skuldi upprunaliga eisini gjaldast aftur í seinasta lagi 1. apríl 1997. Fyri hesum láninum var ikki veitt veðhald frá landsstýrinum.

Afturgjaldingin av omanfyrinevndu lánum var tó við løgtingslóg nr. 45 frá 9. mai 1997 endalig fastløgd á tann hátt, at landsstýrinum var heimilað at veðhalda fyri øllum tí givna láninum til arbeiðsloysisskipanina og afturgjaldstíðin var sett til 5 ár við mánaðarligum gjøldum. Rentan verður 6 % p.a.

Við løgtingslóg nr. 68 frá 2. apríl 1993 var eisini avgjørt, at inngjøld til grunnin í tíðarskeiðnum frá 1. apríl 1993 til 31. mars 1994 verða latin Arbeiðsloysistryggingini. Hesin partur skal ikki afturgjaldast av Arbeiðsloysistryggingini.

Samanlagt eru sostatt hesar upphæddir goldnar til arbeiðsloysisskipanina, tkr.:

| | |
|---|---:|
| Lán sambært løgtingslóg nr. 68 frá 2. apríl 1993 | 48.918 |
| Lán sambært løgtingslóg nr. 21 frá 4. mars 1994 | 12.230 |
| | 61.148 |
| Veiting uttan krav um afturgjaldan sambært løgtingslóg nr. 68 frá 2. apríl 1993 | 30.270 |
| Í alt | 91.418 |

## Úrslit

Ársúrslitið fyri roknskaparárið 1994 er tkr. 16.061, sum stýrið mælur til, verður flutt til næsta ár.

Eftir hetta verður eginogn grunsins pr. 31. desember 1994 kr. 94.946.

## Hendingar eftir roknskaparlok

Víst verður til omanfyri nevnda um gongdina í lógargrundarlagnum fyri grunnin. Umframt hesi viðurskifti er einki hent eftir roknskaparlok, ið kann hava serligan týdning fyri metingina av ársroknskapinum.

## Ognarviðurskifti

Grunnurin er ein sjálveigandi stovnur.

Sambært lógini fyri grunnin verður valt eitt stýri at sita fyri grunninum. Hetta stýrið, sum skal hava fýra limir og sum verður valt fyri eitt trý ára skeið, verður valt soleiðis: Ein limur umboðandi arbeiðsgevarar, ein umboðandi løntakarar, ein umboðandi Tryggingarsambandið Føroyar og stjórin í Landsbanka Føroya.

Landsstýrið tilnevnir formannin í stýrinum.

# Grannskoðaraátekning

Vit hava grannskoðað ársroknskapin, greiddur av leiðsluni, fyri Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum fyri árið 1994.

**Um grannskoðanina**
Í samsvar við alment viðurkendar grannskoðaðarreglur er grannskoðanin skipað og framd við tí endamáli at fáa eina grundaða sannføring um, at tað ikki eru týðandi feilir ella vanta týðandi upplýsingar í roknskapinum. Undir grannskoðanini hava vit, eftir meting um týdning og risiko, kannað grundarlag og prógv fyri upphæddir og aðrar upplýsingar í roknskapinum. Vit hava samstundis tikið støðu til roknskaparháttin og roknskaparligu metingarnar, sum leiðslan hevur gjørt, eins og vit hava mett, um upplýsingarnir í roknskapinum sum heild eru nøktandi.

Grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til fyrivarni.

**Niðurstøða**
Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin er greiddur í samsvari við roknskaparkrøv í lóggávuni, og at hann gevur eina rættvísandi mynd av felagsins ogn og skuld, fíggjarligu støðu og úrsliti.

Tórshavn, tann 7. oktober 1997

Grannskoðarafelagið
**Rasmussen & Weihe, spf.**

| | |
|---|---|
| Klaus Rasmussen<br>statsaut.revisor | Joen Magnus Lamhauge<br>reg. revisor |

# Nýttur roknskaparháttur

## Alment

Roknskapurin er greiddur í samsvar við góðum roknskaparsiði.

Grunnurin er ikki bundin av at gera roknskap í trá við ársroknskaparlógina, men roknskapurin er gjørdur sambært meginreglunum í ársroknskaparlógini.

Nýtti roknskaparhátturin er í høvuðsheitum fylgjandi:

## Inntøkur

Inntøka grunsins - arbeiðsmarknaðareftirlønargjaldið - er fyri løntakarar gjørt upp sum ½ prosent av skattskyldugu inntøkuni fyri 1994 sambært fyribilsskattaskrásetingini.

Fyri arbeiðsgevarar er arbeiðsmarknaðareftirlønargjaldið gjørt upp sum ½ prosent av útgoldnu A-inntøkuni fyri 1994.

Víst verður í hesum sambandi til viðmerkingarnar til inntøkuviðurskiftini í árfrágreiðingini.

## Skuldarar

Skuldarar eru virðisásettir við frádrátti av møguligum tapsvanda, grundað á eina meting av hvørjum einstøkum skuldara.

## Skattur

Grunnurin hevur, vísandi til løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum, ikki skattskyldug.

## Rakstrarroknskapur fyri 1994

| | Nota | 1994 | 1993 t.kr. |
|---|---|---|---|
| Nettoinntøka | 1 | 32.240.142 | *37.671* |
| Aðrar inntøkur | | 0 | *0* |
| Aðrar útreiðslur | | -72.541 | *-96* |
| Avsetingar og tap uppá skuldarar | 2 | -2.684.164 | *-3.879* |
| | | 29.483.437 | *33.696* |
| Latið Arbeiðsloysistryggingini sambært løgtingslóg nr. 68 frá 2. apríl 1993 | | -10.714.429 | *-19.555* |
| | | 18.769.008 | *14.141* |
| Rentuinntøkur | 3 | 3.232.886 | *4.317* |
| | | 22.001.894 | 18.458 |
| Óvanligar útreiðslur | 4 | -5.941.137 | -70 |
| **Ársúrslit** | | 16.060.757 | *18.388* |

## Fíggjarstøða pr. 31. desember 1994

| **Aktiv** | Nota | 1994 | 1993 tkr. |
|---|---|---|---|
| Áogn | 5 | 83.773.976 | *76.506* |
| Tøkur peningur | | 12.123.759 | *5.970* |
| Umferðarfæ í alt | | 95.897.735 | *82.476* |
| **Aktiv í alt** | | 95.897.735 | *82.476* |
| | | | |
| **Passiv** | | | |
| Eginogn | 6 | 94.945.987 | *78.885* |
| Avsett, fallið gjald til Arbeiðsloysistryggingina | 7 | 748.425 | *3.446* |
| Onnur skuld | | 203.323 | *145* |
| Skuld í alt | | 951.748 | *3.591* |
| **Passiv í alt** | | 95.897.735 | *82.476* |
| Møguligar aðrar skyldur | 8 | | |

## Gjaldsførisfrágreiðing fyri 1994

| | |
|---|---|
| Ársúrslit | 16.060.757 |
| Broytingar í ogn og skuld grunsins: | |
| Áogn | -7.267.667 |
| Avsett, fallið gjald til Arbeiðsloysistryggingina | -2.697.806 |
| Onnur skuld | 59.009 |
| Gjaldførisúrslit fyri 1994 | 6.154.293 |
| Gjaldførið pr. 1. januar 1994 | 5.969.466 |
| Gjaldførið pr. 31. desember 1994 | **12.123.759** |

# Notur til árrokskapin

| | 1994 | 1993 t.kr. |
|---|---|---|

## 1. Nettoinntøka

| | | |
|---|---|---|
| Arbeiðsmarknaðareftirlønargjald, løntakarar | 16.681.979 | *18.003* |
| Arbeiðsmarknaðareftirlønargjald, arbeiðsgevarar | 15.558.163 | *19.668* |
| Arbeiðsmarknaðareftirlønargjald í alt | **32.240.142** | *37.671* |

Nettoinntøkan - arbeiðsmarknaðareftirlønargjaldið - er fyri løntakarar gjørt upp sum ½ prosent av skattskyldugu inntøkuni fyri 1994 sambært fyribilsskattaskrásetingini. Fyri arbeiðsgevarar er arbeiðsmarknaðareftirlønargjaldið gjørt upp sum ½ prosent av útgoldnu A-inntøkuni fyri 1994.

## 2. Avsetingar og tap uppá skuldarar (arbeiðsgevarar)

| | | |
|---|---|---|
| Meir avseting móti tapi uppá skuldarar | -1.480.409 | *-1.734* |
| Avskrivað krav um arbeiðsmarknaðareftirlønargjald | -1.055.571 | *-1.741* |
| Avskrivað renta | -148.184 | *-404* |
| Avsetingar og tap uppá skuldarar í 1994 í alt | **-2.684.164** | *-3.879* |

## 3. Rentuinntøka

| | | |
|---|---|---|
| Renta av arbeiðsmarknaðareftirlønargjaldi, arbeiðsgevarar | 194.860 | *1.479* |
| Renta av láni til Arbeiðsloysistryggingina | 2.852.347 | *1.668* |
| Renta av innistandandi í peningastovnum | 185.679 | *1.170* |
| Rentuinntøkur í alt | **3.232.886** | *4.317* |

## 4. Óvanligar útreiðslur

| | | |
|---|---|---|
| Striking av fyrr inntøkuførdum gjøldum frá arbeiðsgevarum | **-5.941.136** | **-70** |
| Óvanligar útreiðslur íalt | **-5.941.136** | **-70** |

Strikingin umfatar gjøld frá undanfarnum árum uppkravd frá arbeiðsgevarum, sum eru undantiknir lógina.

# Notur til árrokskapin

| | 1994 | 1993 t.kr. |
|---|---|---|

## 5. Áogn

| | 1994 | 1993 t.kr. |
|---|---|---|
| Arbeiðsmarknaðareftirlønargjald fyri 1993 og áður (arb.gev.) | 1.966.727 | *5.790* |
| Arbeiðsmarknaðareftirlønargjald fyri 1994 (arb.gev.) | 15.558.163 | *19.668* |
| Føroya Gjaldsstova | 579.492 | *460* |
| Arbeiðsloysistryggingin | 65.669.594 | *50.587* |
| Onnur áogn | 0 | *1* |
| Áogn í alt | 83.773.976 | *76.506* |

## 6. Eginogn

| | 1994 | 1993 t.kr. |
|---|---|---|
| Eginogn primo | 78.885.230 | *60.497* |
| Flutt úrslit | 16.060.757 | *18.388* |
| Eginogn ultimo | 94.945.987 | *78.885* |

## 7. Avsett, fallið gjald til Arbeiðsloysistryggingina

| | 1994 | 1993 t.kr. |
|---|---|---|
| Avsett, fallið gjald til Arbeiðsloysistryggingina | 748.425 | *3.446* |

## 8. Møguligar aðrar skyldur

Tað áliggja ikki grunninum aðrar møguligar skyldur, herundir borgs- og ábyrgdarskyldur, enn tær, sum eru nevndar í roknskapinum.